# Verður Wikipedia nýggja skúlabókin?



**Wikipedia er ein fólkaræðislig alfrøði, sum øll kunnu lesa og rætta í**

UNDIRVÍSING

*Kelda: www.fsg.fo*

Talgilda tøknin hevur elvt til nýggj sløg av bókum og nýggjarundirvísingarhættir. Við amerikanska blaðið Computerworld sigur Gerald Kane, professari á Chestnut Hill College í Boston, at framtíðar skúlabókin verður á netinum, og at hon fer at eita Wikipedia.

- Wiki-tænastan er so mikið góð, at hon hevur fingið meg at broyta undirvísingina. Fyrr helt eg fyrilestrar, men nú eri eg vegleiðari hjá teim lesandi, sum leggja uppgávur í ein felags wiki, ið øll kunnu lesa, sigur Kane professari.

Ein wiki er eitt savn av samanhangandi alnótssíðum, ið øll kunna síggja og rætta í. Wiki, siga tey á Hawaii um nakað, ið er skjótt. Pedia er tikið úr enska orðininum encyclopedia, ið merkir alfrøði.

- Tað er kostnaðarmikið at gera lærubøkur til ein avmarkaðan skara, og so tekur tað eisini drúgva tíð at skriva, prenta og breiða út eina vanliga bók úr pappíri, sigur Kane professari og vísir til skjótleikan í on-line útgávum.

- Tað er ótrúligt so væl hetta opna konseptið roynist, sigur Petur Zachariassen, sum er við í verkætlanini Snar, ið er ein føroyskur undirvísingarportalur.

- Ikki minst til hægri skúlar og lestur dugi eg at síggja veldugar møguleikar. Í wiki skuffunum finst ein ørgrynna at koyra í deiggið, men tú mást sjálv elta og forma tað. Men í fólkaskúlanum hugsi eg, at góða gamla lærubókin – eisini í talgildum líki – framvegis fer at verða ein hollur stuðul í undirvísingini í mong ár.

Stórsta danska avísin Jyllands Posten er farin undir ein portal, sum vendir sær til skúlanæmingar har í landinum. Viden, rópast hesin undirvísingarportalurin, sum lat upp nú skúlarnir byrjaðu.

Hin almenna Wikipedia, sum vit hava atgongd til, er ein støðugt vaksandi online alfrøði, ið eisini er á føroyskum. Í løtuni eru 2530 føroyskar greinar á Wikipedia, sum byrjaði á føroyskum hin 20. juni 2004. Enska útgávan, sum byrjaði í januar 2001, er heimsins stórsta alfrøði.




## PARTABRØVINI HÆKKAÐU AFTUR.

Lánikreppan í USA varð aftur í andglettinum í farnu viku. Partabrøv lækkaðu støðugt alla farnu viku og hósdagin stóð illa til, tá t.d. evropisk partabrøv lækkaðu heili 3,5% - tað mesta í fleiri ár. Fyri at styrkja álitið á marknaðirnar og tálma gjaldføriskreppuna á peningamarknaðinum, gjørdi amerikanski tjóðbankin av at lækka diskonturentuna, fyri fyrstu fer síðan 2004. Rentan lækkaði 0,5% í 5,75%. Hetta sissaði íleggjarar somikið, at partabrøv eru hækkaðu aftur. Eftir rentulækkingina eru sterkar ábendingar um, at Fed nú fer at geva búskaparvøkstrinum størri ans enn prísvøkstrinum. Hetta merkir, at FED kann væntast at lækka rentuna aftur, um amerikanski búskaparvøksturin verður hóttur. Saman við gjaldoyrainnspræningini í næstseinastu viku og hugburðsskiftinum, hevur FED givið tvey sterk tekin um, at tey eru til reiðar at tryggja støðugleika á marknaðunum. Hetta seinasta er kanska júst tað ið skal til fyri at vinna álitið á marknaðunum aftur.

## RENTURNAR LÆKKAÐAR EITT VET

Danska 10 ára lánsbrævarentan er lækkað eitt vet farnu vikuna. Orsøkin er óstøðugu partabrøvini, men eisini møguleikin fyri at ECB, eftir at Fed lækkaði diskonturentuna, fer at broyta teirra peningapolitikk, so hann verður meira stimbrandi.

## ÓVISSAN HELDUR FRAM

Tá evropiski partabrævakursirnir vóru lægstir í seinastu viku, fóru teir niðurum ráklinjuna frá 2003 og botnin frá februar. Var hetta framhaldandi støðan hesa vikuna høvdu íleggjarar sannlíkt broytt lutfallið í virðisbrævaognunum og selt fleiri partabrøv - hetta hendi ikki. Hóast partabrøv eru hækkaði aftur, er enn ov tíðliga at siga um korrektiónin er av á hesum sinni. Mest sannlíkt fara vit komandi tíðina at síggja partabrøv sveiggja niður móti ráklinjuni aftur. Tí mæla vit íleggjararum til at bíða við at keypa partabrøv fyrr enn marknaðirnir eru vorðnir støðugari. Mest áhugaverda lyklatalið hesa vikuna, sum kann ávirka marknaðirnar, kemur fríggjadagin. Tá fáa vit at vita hvussu nógvar nýggjar bíleggingar handilsvirkini í USA hava fingið.

**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Donsk 10-ára renta**




| Marknaðir | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Norðurlond | 1371,11 | -2,01% |
| Alheims partabrøv | 8329,32 | -0,74% |
| Atlantic Petroleum | 1068,00 | -1,48% |
| Føroya Banki | 226,00 | -9,24% |
| Eik Banki | 692,00 | -2,26% |
| KB Trygg Eurostoxx | 108,03 | -0,87% |
| USD | 552,31 | + 2,36% |
| JPY | 4,81 | + 5,92% |

Broytingarnar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðarnar.
Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tapi ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.

Postsmoga 3090, Bókbindaragøta 8, 110 Tórshavn, Tel 351500, Faks 351501, kf@kaupthing.fo, www.kaupthing.fo

KAUPTHING BANK